Molde vil binda Jákup

Norska felagið bjóðar Jákupi Mikkelsen nýggjan tvey ára sáttmála

FÓTBÓLTUR
Eyðun Klakstein

Vit hava áður greitt frá, at norska felagið Molde hevur havt áhuga í at leingja samstarvið við landsliðsmálverjan Jákup Mikkelsen.

Higartil hevur hetta verið orð og ynski, men nú ætlar leiðslan í felagnum at lata Jákupi eitt ítøkiligt uppskot um ein nýggjan sáttmála millum partarnar.

Tá Jákup til Molde í summar var ein fyribils hálvt ára avtala gjørd, og hesa tíðina skuldi greiða fáast á, um partarnir vóru sinnaðir fyri longri samstarvið.

Í Molde søgdu teir, at teir høvdu havt trupulleikar við at fáa spælarar at trívast har, og tí vildu teir vita, hvussu tað fór at vera við Jákupi, áðrenn teir gjørda sáttmála í fleiri ár.

Leiðslan í Molde er nøgt við avrikið hjá Jákupi Mikkelsen í felagnum og vil hava hann at halda fram í tvey ár afturat

Jákup nóg góður

Nú hevur Jákup verið í Molde í hálvt ár, og komandi vikuskiftið skal hann eftir ætlan spæla seinasta dystin fyri Molde.

Men leiðslan í Molde sigur nú, at hon fer at bjóða Jákupi ein nýggjan tvey ára sáttmála.

– Í løtuni hyggja vit ikki eftir nøkrum øðrum málverja, tí vit meta avrikið hjá Jákupi sum nóg gott til, at vit kunnu bjóða honum sáttmála, sigur Espen Silseth, sum er stjóri í felagnum, við norsku tíðindastovuna NTB.

Umframt Jákup hevur Molde tveir aðrar málverjar, sum kunnu spæla á besta liðnum. Teir eru Knud D. Lillebakk og Edward Gustafsson, sum hevur spælt tveir A-landsdystir fyri Svøríki.

Vann plássið

Jákup kom beinleiðis á liðið hjá Molde, tá hann byrjaði í felagnum í juli mánaði. Fyrstu dystirnar hildu trupulleikarnir við deyðbóltum, sum liðið hevði havt framman undan, fram, og tí var Jákup settur á beinkin nakrar dystir.

Tá hann nakrar vikur seinni kom heimaftur, eftir at hava spælt landsdyst fyri Føroyar, varð hann aftur settur á liðið, tí avloysarin hjá honum var skaddur.

Síðani tá hevur Jákup vart málið hjá Molde, og tað hevur gingið væl. Hóast Molde sunnudagin tapti 3-0 á heimavølli, so var avrikið hjá Jákupi gott, siga norskir fjølmiðlar.

Í øllum førum hevur tað verið so gott, at norska felagið vil hava føroyska málverjan at halda fram í felagnum.

Laudrup ætlar sær úr skugganum

Michael Laudrup verður ikki hjálparvenjari hjá Morten Olsen og Danmark, tá HM endaspælið verður liðugt

VÆL UMTÓKTUR HJÁLPARVENJARI
Jóannes Hansen



Tað man vera langt síðani – um tað nakrantíð er komið fyri – at danska fótbóltslandsliðið hevur havt ein so væl fagnaðan venjara, sum teir hava nú. Og tað hevur avgjørt ikki gjørt popularitetin minni, at Michael Laudrup er hjálparvenjari hjá Morten Olsen. Men nú verður skjótt neyðugt hjá Mortani og DBU at finna ein nýggjan hjálparvenjara.

Seinnapartin mánadagin boðaði Michael Laudrup frá, at hann hevur gjørt av at gevast í hjálparvenjarastarvinum. Hann fer at røkja starvið, inntil HM endaspælið í Japan og Suðurkorea verður liðugt komandi summar.

Michael Laurdup sigur seg ikki vera misnøgdan við at vera stýrimaður hjá Morten Olsen, men hann dylur ikki, at hann fegin ynskir at royna skiparakjansin. Michael Laudrup er høgt í metum, og tað sigst, at honum standa fleiri góð venjarastørv í boði. Brøndby, sum Michael Laudrup spældi fyri, áðrenn hann gjørdist yrkisspælari í Italia, hevur verið nevnt sum ein góður møguleiki, men Laudrup vil einki siga uttan at hann ætlar sær at vera venjari.

Fyrstu dysturin hjá Morten Olsen og Michael Laudrup við stýrisvølin á danska landsliðnum var 16. august í fjør, tá Danmark vann 2–0 á Føroyum á Tórsvølli. Hóast nøgv fullveldis– og yvirtøkuprát, so er tað neyvan nakar trupulleiki at finna nøgvar føroyingar, sum einki høvdu havt ímóti, at síðsti dysturin hjá Michael Laudrup saman við danska landsliðnum ikki varð fyrrenn HM finalan komandi summar!

Stór uppgáva á skránni í morgun

U–19 landsliðið fekk akkurát fatur í flúgvaranum úr Kastrup og til Eysturríkis

EM UNDANKAPPING
Jóannes Hansen

Føroyska U–19 landsliðið er í hesi vikuni í Slovenia, har teir taka lut í EM undankapping. Uppgávurnar eru sera stórar. Í dag skulu teir spæla ímóti Skotlandi, fríggjadagin skulu teir spæla ímóti Slovenia, og sunnudagin verður Grikkaland mótstøðuliðið.

– Eg kenni ikki so nógv til spælararnar á hinum liðunum. Skotland royna vit at fáa upplýsingar um nú undan dystinum. Hini bæði liðini fara vit at kanna, tá tey spæla í kappingini her niðri, sigur Jógvan Martin Olsen, venjarin, sum ikki ivast í, at avbjóðingarnar vera ivaleysa stórar hjá hansara monnum:

– Vit vita, at skotarnir hava eitt gott lið. Vit rokna við, at Slovenia hevur eitt uppaftur betri lið, og tað er eingin loyna, at fótbóltsmenningin í Grikkalandi hevur verið sera stór tey seinastu árini, staðfestir Jógvan Martin Olsen.



Jógvan Martin Olsen, venjari hjá U19-landsliðnum

Dysturin ímóti Skotlandi verður, sum allir hinir dystirnir í kappingini, spældur tíðliga á degnum. Tað kemst av, at einki ljósanlegg er á vøllunum. Tí verður bara spælt í dagsljósi. Dysturin ímóti Skotlandi í dag verður longu klokkan tíggju føroyska tíð.

Nógv seinkaðir

Orsakað av veðrinum var føroyska landsliðið mánadagin fleiri tímar seinkað úr Vágum. Eftir upprunaligu ætlanini skuldu teir havt góða tíð í Kastrup, áðrenn teir skuldu til Graz í Eysturríki, men tað gjørdist heilt knapt. Ein líltan hálvan tíma eftir at flogfarið úr Føroyum hevði sett seg í Kastrup, lætti flogfarið til Eysturríki, men tað gekk akkurát hjá føroyska ferðalagnum.

Tá teir mánakvøldið komu til Graz í Eysturríki, stóð bussur fyri teimum. At koyra til Murskasobota í Slovenia tók fimm korter. Fyrrapartin í gjár var venjing á skránni. Umstøðurnar eru góðar, har U–19 landsliðið heldur til.

Aftur ein venjari fingið reyða kortið

Atli Gregersen missir venjaran, sum skal taka sær av Viborg í superliguni

Tað er ikki lukkuligt, sum reyða kortið í hesi vikuni verður nógv brúkt í superliguni. Í gjár vistu vit at siga, at venjarin hjá botnliðnum Silkeborg, Benny Johansen, var uppsagdur. Og fyrrapartin í gjár hevði aftur eitt felag í Jyllandi reyða kortið á lofti.

Kim Poulsen fekk á fundi við leiðsluna í Viborg at vita, at hann var sagdur úr starvinum. Felagið kundi ikki liva við, at úrtøkan í fyrstu tólv dystunum bara hevur verið ellivu stig, og at liðið er á fjórði niðasta plássinum.

Nýggjur venjari í Viborg er Søren Kusk. Hann hevur higartil í ár verið venjari í Randers Freja, har føroyingurin Atli Gregersen er í 1. liðs hópinum.

Tað er púra greitt, at í hvussu so er annað av liðunum í superliguni, sum í hesi vikuni hevur fingið nýggjan venjara, fer at fáa stig komandi sunnudag. Tá fær Silkeborg vitjan av Viborg!

At fleiri toppvenjarar í Danmark nú fara at ganga fyri einki, átti kanska at givið teimum í Fótbóltssambandinum okkurt gott hugskot um evni at vera landsliðsvenjari: Kim Poulsen, Benny Johansen og hví ikki Michael Laudrup?

jh

Nú skal kappingin eftirmetast

Fótbóltsfundurin er settur at vera leygardagin 17. november

EFTIRMETING
Jóannes Hansen

Tað er vorðin fastur táttur í fótbóltsárinum, at FSF kallar umboð fyri feløgini til fundar, tá kappingarárið er gott og væl sodnað. Á heimasíðuni hjá FSF sæst nú, at fundurin verður leygardagin 17. november. Lagt verður fyri klokkan 10, og tað verður hildið fram út á seinnapartin. Fundurin verður í B36 húsinum.

Upprunaliga var bara ein eftirmeting av kappingarárinum á skránni. Eftirmetingin skuldi brúkast sum grundarlag undir tosinum um, hvussu kappingin komandi árið kundi verða løgd uppaftur betri til rættis.

Tey seinnu árini hava onnur viðurskifti enn bara sjálv kappingin verið á skránni. Fundurin hevur alt meiri verið brúktur sum høvi at tosa um fótbóltspolitiskar spurningar, m. a. fyri at lodda dýpið fyri vánunum at fáa møguligt uppskot um broytingar í ásetingunum samtykt á aðalfundinum.

FSF vil hava, at formenninir í feløgunum møta á fundinum, og at teir hava ein nevndarlim og venjara við sær.

FÓTBÓLTSKVØÐA

Leikarar, venjari og hjálparvenjari á 5. deildarliðnum hjá NSÍ fara hervið at takka øllum mótstøðumonnunum og áskoðarum okkara fyri eitt gott, hendingarikt og ikki minst hugnaligt kappingarár 2001. Eingin ivingur skal vera um, at vit eisini í komandi kappingarári fara eftir gullinum, - sætta árið á rað. Ein serlig tøkk til høvuðssponsorin E.J. ASFALT í Selmundarfirði fyri dyggan stuðul í fama kappingarári.

Við fótbólts- & frændakvøðu
Sigmundur Jóhannesen, venjari